FYLGISKJAL 4

Góði Dan

Stýrið hevur viðgjørt uppskotið og ynskir at vísa á hesi viðurskifti í lógaruppskotinum:

- Kapitaltap
- Lán og tilsagnir um lán
- Um avleiðingar fyri vinnuna
- Ábyrgd hjá stýrinum

Vegna sera stutta skotbráið verður møguliga neyðugt at gera fleiri viðmerkingar seinni í tilgongdini.

Kaptaltap
Í lógaruppskotinum stendur, at talan er ikki um niðurkapitalisering, men at lán uttan rentu hevur við sær, at Íleggingargrunnurin reelt hevur eitt kapitaltap.

Stýrið metir, at ein útrokning av veruliga kapitaltapinum eigur at standa í uppskotinum.

Lán og tilsagnir
Við ársbyrjan 2025 eru tvær tilsagnir um lán á tils. 142 mió. kr.

Um avleiðingar fyri vinnuna
Í lógaruppskotinum stendur, at væntast kann, at "vanligu fíggingarstovnar landsins ...kunnu veita fígging til møguligar lántakarar í Íleggingargrunninum, sum ... ikki kunnu fáa lán úr Íleggingargrunninum í eitt áramál."

Stýrið skal gera vart við, at vanligu fíggingarstovnar landsins javnan heita á Íleggingargrunnin um at vera við í fígging av størri verkætlanum, m.a. vegna ásett krøv um stødd á einstøkum engagementum. Somuleiðis er tað ein sannroynd, at vilji og áhugi hjá útlendskum lánveitarum skjótt kunnu broytast, t.d. um búskaparlig afturgongd verður í eitt áramál, ella um onnur viðurskifti gera, at áhugin fyri at veita lán í einum lítlum og fjarskotnum búskapi minka.

Ábyrgd hjá stýrinum
Stýrið metir, at tørvur er á greiðari ásetingum í mun til møguliga ábyrgd hjá stýrinum í sambandi við játtan av láni til ávikavist P/F Vága Floghavn og P/F Suðuroyartunnilinum. Lógaruppskotið heimilar Íleggingargrunninum at veita lán til hesi bæði feløg, og tað tykist undirskilt, at *tað til eina og hvørja tíð sitandi stýri* skal veita hesi lán, tá tørvur er á tí. Við hesum verður m.a. vikið frá vanligu treytunum um, at stýrið óheft skal meta um dygdina á lánunum og at gera av hóskandi trygd fyri lángeving grunsins.

Undir hesum umstøðum metir stýrið, at rættast er at tilskila, at stýrið ikki ábyrgjast eftir vanligu reglunum fyri tapsvanda í sambandi við hesi bæði engagementini.
"